TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Snarskivan

Snarskivan er avgreiðslan hjá Tórshavnar kommunu

Deildin er bindilið millum borgaran og tær tríggjar fyrisitingarnar: Miðfyrisitingina, Teknisku fyrisitingina og Trivnaðarfyrisitingina.

Arbeiðsøkið, ið Snarskivan røkir, er tænasta í breiðari merking til starvsfólk og borgara.

Snarskivan heldur til í snotiligum hølum í miðbýnum í Havn. Avgreiðslan er saman við postverkinum í gamla posthúsinum

www.torshavn.fo

## Samskiftisstarvsfólk til Snarskivuna

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir starvsfólki til samskiftisøkið í Snarskivuni.

**Tað er tær vit leita eftir, um tú**
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og taka ábyrgd av minni og størri verkætlanum
- hevur hegni at bera fram kunnandi tilfar innanhýsis og í fjølmiðlunum
- hevur royndir við at nýta web tøkni sum kunningaramboð
- hevur góðan førleika í føroyskum

**Uppgávurnar á samskiftisøkinum í Snarskivuni**
Uppgávan verður at taka hond um samskiftið innanhýsis og úteftir, tað merkir:
- skipa fyri neyðugum tíðindaflutningi til borgaran, fjølmiðlarnar og kunningarstovur
- skipa fyri og hava ábyrgd av nýgerð og dagføring av faldarum
- uppsetan av lýsingum og kunnandi tilfari við myndatalvum
- hava ábyrgd av nær- og fjarneti, kunngerðartalvum og kundaskíggjum

**Setanarviðurskifti**
Starvið er fulltíðarstarv og verður sett 1. august ella eftir nærri avtalu. Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Ynskir tú at vita meira**
so set teg í samband við Mourits Mouritsson, deildarleiðara, ella Niels Una Dam samskiftisstarvsfólk.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 28. juni 2004. Viðmerk á umsóknina "Samskiftisstarvsfólk"



# Starvslýsingar á www.portal.fo

Kostnaður: (um lýsingin eisini er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 500,- |
| 2 vikur | kr. 750,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.000,- |

Kostnaður: (um lýsingin ikki er í Sosialinum)

| | |
|---|---|
| 1 vika | kr. 750,- |
| 2 vikur | kr. 1.000,- |
| til freistin at søkja er úti: | kr. 1.250,- |

**2 lýsingar = -20% í avsláttri**
**3 ella fleiri = -30% í avsláttri**

Sosialurin
tel 341800 · fax 341801
teldupostur: lysing@sosialurin.fo


## HEILSANIR



**Góða Eir**
Hjartaliga tillukku á 10 ára degnum sum var 21. Okur vóna, at tú fært ein góðan dag. Jesus signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, pabba og Marita**



**Góða fitta Eir**
Lukku og gleði á tínum fyrsta runda degi, sum var 21. juni.
**Ynskja Bárður, Marner, Linda, Jóngerð og Ronni**



**Góða Katrin**
Vit fara at leingjast eftir tær, nú tú fert í praktik á oynni Forlegandros í Grikkalandi. Má Jesus fylgja tær.
**Ynskja Erhard og mamma**



**Góðu Súsanna og Kristina**
Hjartaliga tillukku við students- og 9-floksprógvinum. Her eru tit fittar niðri á Terra Mitica.
**Heilsan Heini**



**Olë chicas**
Hjartaliga tillukku við students- og 9-floksprógvinum. Hetta var flott. Alt tað besta í framtíðini.
**Heilsan mamma og babba**


## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.......................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................
.................................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: .....................................................................
Bygd/býur: ................................... Tlf.: ................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«




## TILTØK

**Lívdin**
*í Fimleikarhøllini*
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjuløta saman við børnunum við sangi og søgu. Kl. 11.10 ein steðgur við drekka. Tilbiðjanarmøti verður kl. 11.30 við talu, lovsangi og breyðbróting. Barnatiltak verður í Hoyvíkshøllini frá kl. 11.30-12.15. www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. www.rhema.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael.
Fríggjadagin einki ungdómsmøti vegna tiltak í høllini á Hálsi, sum Doulos skipar fyri.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Paula Høj, ABC v/ Ása Lutzen, evnið er: Reinsan við blóði Jesusar, 2 partur, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar mán-frí. frá kl. 8-16.

**Meinigheitin í Hoyvík uppi á Brekku 3**
Hóskvøld einki ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jógvan Steintún, evnið: Spakføri, sunnudagsskúlin er farin í summarfrí.
Útimøti á Vaglinum kl. 22 – um viðrar.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Hebron, Argir**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. www.hebron.fo

**Frá Ebenezer**
Mikudagin kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.
Hósdagin Ungdómsmøti.
Summarsteðgur til 17. juli.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.
Umboð frá Doulos luttaka á møtunum. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Mikudagin kl. 15 Bøn.
Mennirnir møtast kl. 19.30.
Leygardagin kl. 11 Útifundur.
Sunnudagin kl. 11 Møti, Palle Petersen talar, kl. 18 Møti við vitjan frá Doulos. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 20 Húsmøti hjá Duritu og Ejvind Mouritsen, Áarrás 16, Argir.
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn – útferð – um viðrar.
Sunnudagin kl. 18 Blákrossmøti v/ Jaspur Langgaard, sangarar luttaka.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Orðsins tænasta v/ kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Orðsins tænasta v/ kommunión í Mariukirkjuni.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.30-18. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. »Ver her og vak við mær, vak og bið«.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Bønarmøti verður í Saron kl. 20. Útimøti verður kl. 21.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið kl. 22 »Jesusfest« uttanfyri nýggja bygningin.
Sunnudagin kl. 18 Møti við ungdómi frá Levende Ord úr Bergen. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Berøa, Saltangará**
Mikudagin kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarmøti, Birgir Poulsen talar, evnið: Nehemias. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Klæmint Eliasen talar. Evnið: Brævið til samkomuna í Sardes (Op. 3:1-6). Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Ongin hugnaløta fyri ung verður fríggjakvøldið.
Sunnumorgunin kl. 11 Møti við André Matras.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Mikukvøldið kl. 20.30 Lovsangur og tilbiðjan.

**Samkoman Malta Skagerak-fundirnir**
Cosmos Trawl, Østhavnen, Hirtshals. Fundirnir verða soleiðis: 24. juni, 8. juli og 23., 24. og 25. juli. Á fundunum 23.-25. juli luttaka ferðandi og onnur við vitnisburði og sangi. 5. august verður seinasti fundur. Allir fundirnir eru kl. 19.30. Aftaná fundirnar bjóða vit ein kaffimunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 21. juni***
kl. 10-12 Opið hús
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin, tlf. 316491.
**Tilmelding til Sandstúrin 28.-29. juni á tlf. 316491.**
**Úr Steinatúni 28. juni kl.9.20 til Gomlurætt. Úr Skopun 29. juni kl. 10.30. Kostnaður 280,- gjaldast áðrenn fríggjadagin.**
**Ólavsøkulistin er komin.**
***Týsdagur 22. juni***
kl. 10 Vit syngja saman við gestum úr Skagafirði í Íslandi, Óli VAng. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14-17 Opið hús
***Mikudagur 23. juni***
kl. 10-12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við.
kl. 12 Døgurði
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia
kl. 15 Túrur
***Hósdagur 24. juni***
kl. 10-17 Opið hús
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 25. juni***
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Mikudagin 23. juni verður gongutúrur Røðin Skeiðskarð-Skælingsfjall (Kommunumarkið). Torførur túrur. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 19.00. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 23. juni***
Farið verður ein túr í Koytu á Sandi. Vit hittast í Norðaru Koytu kl. 14, har Marius Clementsen tekur ímóti okkum. Aftaná verður farið inn í Slavansdalin, har vit fáa ein góðan drekkamunn í Fjallastovuni. Vit fara uml. kl. 15.15 úr Koytu inn í Slavansdalin. Kostnaður fyri túrin 70,- kr.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 21. juni***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 22. juni***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 23. juni***
Prát og sangur
***Hósdagin 24. juni***
Boccia v/ Jóhan Danielsen
***Fríggjadagin 25. juni***
Vit møtast kl. 15 við Sjómansheimið í Runavík. Vitjað í urtagarðinum hjá Esther og John Poulsen og fáa frágreiðing um fyrstu niðursetufólkini í Runavík. Aftaná opið hús hjá Jensinu.
**Summarfrí verður frá 28. juni til 6. september 2004. Gott summar ynskir Fløvin.**

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Eldrafelagið Borgin**
Hugnaløta verður sunnukvøldið 30. juni kl. 20 fyri limum og øllum pensjónistum í Fuglafjarðar kommunu. Undirhald: Torsdagskoret úr Flensborg og møguliga eisini Fuglafjarðar Sangkór. Frits Johannesen fyriskipar. Ábit, kaffi og te ókeypis.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10 · tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557. Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




**Billettprísur: 70,- kr.**
Mikudagin 23.06. kl. 19[00]
Hósdagin 24.06. kl. 19[00]




Mikudagin 23.06. kl. 22[15]
Hósdagin 24.06. kl. 22[15]




Mikudagin 23.06. kl. 19[30]
Hósdagin 24.06. kl. 19[30]
*– Seinasta sýning*




Mikudagin 23.06. kl. 22[00]
Hósdagin 24.06. kl. 22[00]
*– Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
**Fríggjadagin 25.06.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**